# Mun-andi hægri støði

**FLOGBÓLTUR**
**Bæði kvinnu- og mansliðið hjá Aalborg HIK venja í høllini fýra ferðir um vikuna, umframt at tey venja styrkisvenjing tvær ferðir um vikuna. – Tað burdu vit eisini gjørt í Føroyum, tí tað ger stóran mun, sigur Jóhan Petur á Stongum**

Rólant Waag Dam

Jóhan Petur á Stongum er mentur nógv sum flogbóltsleikari, síðani hann flutti niður at spæla við Aalborg HIK. Bæði kvinnu- og mansliðið venja seks ferðir um vikuna, umframt at spæla dystir.

Hetta áttu vit eisini at gjørt í Føroyum, er Jóhan Petur á Stongum sannførdur um, tí bara við at venja so mikið nógv, kanst tú taka teg nógv fram sum leikari.

Hann greiðir annars frá, at støði í mansdeildini er munandi hægri enn í Føroyum.

– Okkara lið er nakað betri enn toppurin í føroysku deildini. Vit hava breiðari hóp og fleiri leikarar, sum eru betri enn teir í føroysku deildini. Og so er toppurin í okkara deild nógv hægri enn bestu føroysku liðini, metir Jóhan Petur á Stongum.

Aalborg HIK er annars ikki so langt frá danska toppinum. Seinastu mongu árini hevur liðið spælt seg til play-off dystirnar og sostatt verið millum fýra tey bestu liðini í Danmark. Í fjør gjørdist talan um eitt regulert fjórða pláss, meðan liðið í 2008 vann silvur.

*rolant@sosialurin.fo*



*25 ára gamli Jóhan Petur á Stongum hevur eisini verið hjálparvenjari hjá Kristiani Mikkelsen á føroyska kvinnulandsliðnum, umframt at hann spælir við manslandsliðnum*

*Savnsmynd*

# Skifti SÍ út við Aalborg HIK

**FLOGBÓLTUR Jóhan Petur á Stongum, sum seinastu mongu árini hevur verið eitt av sjónligastu andlitunum á føroyska flogbóltspallinum, er fluttur til Aalborg, har hann spælir á besta mansliðnum og er venjari hjá besta kvinnuliðnum**

Rólant Waag Dam

Seinastu tíggju árini hevur Jóhan Petur partur av besta mansliðnum hjá SÍ, og seinastu fimm árini hevur hann vant kvinnuliðið hjá felagnum í Sørvági.

Í ár er øðrvísi. 25 ára gamli sørvingurin hevur enn somu leiklutir, men nú eitur felagið Aalborg HIK, har Jóhan Petur er partur av mansliðnum, umframt at hann er venjari hjá besta kvinnuliði felagsins.

Mansliðið spælir í bestu donsku flogbóltsdeildini, meðan kvinnurnar eru at finna í næstbestu donsku deildini.

## Landsliðsvenjarapar

Vanliga er tað Kristian Mikkelsen, sum hevur ábyrgdina av besta kvinnuliðnum hjá Aalborg HIK, men tá hann fór heim í tveir mánaðir, loysti Jóhan Petur á Stongum hann av, soleiðis at Kristian Mikkelsen fekk ábyrgdina av kvinnuliðnum í Sørvági, meðan Jóhan Petur á Stongum fór til Danmarkar at venja kvinnuliðið í Aalborg.

– Kristian kemur so niður aftur nú, og tá fari eg so at vera hjálparvenjari hansara á sama hátt, sum eg var tað til Oyggjaleikirnar, greiðir Jóhan Petur á Stongum frá.

Hann ætlaði upprunaliga ikki at vera longri niðri enn teir báðar mánaðirnar, hann skuldi avloysa Kristian Mikkelsen, men fann so brádliga upp á fara at lesa.

– Eg helt, at freistin at søkja var farin, men brádliga fann eg út av, at eg kundi náa tað, so eg søkti og slapp inn, greiðir Jóhan Petur á Stongum frá, sum nú lesur arkitektur og design í Aalborg.

Jóhan Petur á Stongum hevur annars lært til timburmann, men mátti gevast við hesum, tí ein skaði í økslini gav honum ov nógvar trupulleikar. Tí var upplagt at royna aðrar leiðir, heldur hann.

## Lorta byrjan

Jóhan Petur so gjørdi og hevur nú búleikast í Aalborg í nærum tveir mánaðir. Fyri kortum byrjaði danska flogbóltskappingin og Jóhan Petur fekk debut í einum steypadysti.

– Tað var eingin ynskibyrjan, eg fekk. Eg byrjaði dystin á beinkinum. Hetta var ein steypakappingardystur, men eg kom so inn, kiksaði servuna og varð tikin út aftur, greiðir Jóhan Petur flennandi frá.

Síðani hevur tað hepnast betri hjá honum. Í landskappingardystinum aftaná kom hann inn í øðrum setti og spældi dystin út, meðan hann nú um vikuskiftið byrjaði inni og spældi inn í triðja sett, tá hann varð avloystur.

Reglurnar í flogbóltinum er broyttar soleiðis, at libero'in kanst tú skifta út alla tíðina. Í Aalborg HIK er Jóhan Petur sjálvur triðji, sum kappast um júst hetta plássi og við broyttu reglunum eru altíð tveir leikarar til liberoplássið við í hópinum.

Tað merkir aftur, at kappingin er serstakliga hørð.

## Tveir føroyingar á liðnum

Jóhan Petur á Stongum er ikki einasti føroyingurin, sum stríðist fyri einum plássi á besta mansliðnum hjá Aalborg HIK. Gunnar Jørgensen, sum er úr Klaksvík og hevur spælt við Mjølnir, spældi í fjør við næstbesta liðnum hjá HIK Aalborg, men er í ár partur av besta liðnum.

Teir báðir hava higartil verið vitni til tvey landskappingartap hjá liði teirra. Fyrst tapti HIK Aalborg 0-3 móti Gentofte Volley, har tað kortini var talan um ógvuliga jøvn sett, meðan liðið í gjár tapti 3-2 móti Holte IF.

*rolant@sosialurin.fo*